Bára Michelsen

Fra: Gunnleyg Árnafjall
Sendt: 31. oktober 2025 15:24
Til: Bára Michelsen
Cc: Fíggjarmálaráðið
Emne: SV: Til ummælis: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)

Góðan dagin Bára

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur ikki viðmerkingar til uppskotið.

Vinarliga/Kind Regards

Gunnleyg Árnafjall
fíggjarfulltrúi/financial advicer
Tel. +298 556072
gunnleyga@uvmr.fo
www.uvmr.fo

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Ministry of Foreign Affairs, Industry and Trade

FØROYA LANDSSTÝRI
The Government of the Faroe Islands

Fra: Bára Michelsen <Bara@fmr.fo>
Sendt: 17. september 2025 15:31
Til: LMS - Aðalráðini <LMS-Adalradini@drift.far.fo>; Landsbanki Føroya <landsbankin@landsbankin.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Búskaparráðið <buskaparradid@buskaparradid.fo>; LgPostur <Postur@lg.fo>; industry@industry.fo; Ann Ellingsgaard <ann@samstarv.fo>
Cc: Ruth Vang <Ruth@fmr.fo>; Bjarni Askham Bjarnason <bab@fmr.fo>; Eli Christiansen <Eli@fmr.fo>
Emne: Til ummælis: Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)

Góðan dagin

Hjálagt verður sent tykkum til ummælis **"Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan (Hámark fyri rakstrarútreiðsluvøkstri og løguætlan)"**

Í samgonguskjalinum stendur, at "í breiðum politiskum semjum skulu vit tryggja búskaparliga haldføri og gera langtíðar rakstrar- og løguætlanir. Í hesum sambandi verður gjørt eitt fíggjarpolitiskt regluverk."

Frágreiðingar frá Búskaparráðnum vísa, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur, og mælir ráðið til eitt fíggjarpolitiskt regluverk.

Uppskotið fevnir um landsins fíggjarlóg og hevur sum endamál at seta hámark fyri, hvussu nógv útreiðslurnar hjá landinum til rakstur kunnu vera. Fíggjarlógin kann ikki hava rakstrarútreiðslur, sum til samans eru meira enn 1% hægri enn rakstrarútreiðslurnar undanfarna ár, umframt framskriving fyri lønar- og prísvøkstur.

Uppskotið fevnir eisini um løgujáttanir og løgukendar játtanir hjá landinum, sum skulu vera í samsvari við løguætlan, sum Løgtingið hevur samtykt.

Uppskotið hevur ásetingar um, hvussu hámarkið skal verða ásett, og hvussu eftirlit skal verða við, at hámarkið verður hildið.

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Møgulig ummæli ella ummælisskriv skulu sendast til fmr@fmr.fo í seinasta lagi 15.10 2025.

Vinaliga / Kind regards

Bára Michelsen
Samskipari / Coordinator

Office: +298 352020
Mobile: +298 552030
bara@fmr.fo

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Fíggjarmálaráðið
Ministry of Finance
Tinganes
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands

Office: +298 352020
www.fmr.fo